## Claus aftur eitt stig

**Fyri triðju ferð endaði tað við javnleiki, tá ið Coventry royndi seg á nýggja stadion, har venjarin heldur, at tað kann gerast væl meiri lívligt, enn tað higartil hevur verið**

ONGLAND
1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað er ov friðarligt á Ricoh Arena, sum heitið er á nýggja stadion hjá Coventry. Hetta hevur fleiri ferðir verið at hoyrt seinastu vikurnar. Coventry venjarin Micky Adams heldur, at Claus Bech Jørgensen og liðfelagarnir hjá honum eiga størstu ábyrgdina fyri at gera nakað við hetta. Akustikkurin sigst vera góður, og tað fer ivaleyst at hoyrast, at áskoðarar eru hjástaddir, um teir fara at hava nakað at fegnast um og at fagna liðnum fyri, heldur Coventry venjarin.

Higartil hava teir spælt fýra ferðir á heimavølli í hesum kappingarárinum, og leygardagin endaði tað fyri triðju ferð javnt. Reading, sum verður roknað at verða møguligur uppflytari, vitjaði, og gestirnir løgdu seg á odda í 1. hálvleiki.

Coventry javnaði, tá ið tað restaðu fýra minuttir. Tá var Claus Bech Jørgensen farin av vøllinum. Hann var millum teir fyrstu ellivu hjá Coventry, og hann varð skiftur út, tá ið tað restaðu trettan minuttir. Tá hevði Claus tiltuskað sær gult kort.

Eftir sjey tey fyrstu umførini hevur Coventry fingið sjey stig, og á støðutalvuni eru teir eitt vet niðanfyri miðstrikuna.

# KR og Keflavík fingu fult

**Rógvi Jacobsen var alla tíðina á KR liðnum, sum vann. Keflavík vann eisini, men Símun Samuelsen var ikki á vøllinum**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Rógvi Jacobsen var í álopinum allar 90 minuttirnar, tá ið hann segði farvæl við KR og íslendskan fótbólt. Rógvi taldist ikki millum málskjúttarnar, tá ið KR á heimavøllinum í vesturbýnum vann 2-0 á Vali, sum er næstovast.

Tað var álopsfelagin hjá Rógva, Grétar Ólafur Hjartarson, sum skoraði bæði KR málini. Tað gjørdi hann í síðstu løtu undan steðginum og tveir minutir undan leikloki.

Hetta var fjórði KR sigurin á rað. Hetta var seinasti heimadysturin í hesum kappingarárinum. Samanteljingin sigur, at KR hevur vunnið fimm ferðir á heimavølli, og fýra ferðir hava teir tapt. Málmunurin á heimavølli er 12-12.

KR er á fimta plássi. Í síðsta umfarinum skulu teir spæla á útivølli í Akranesi móti ÍA, sum er nummar trý.

Nú er tað greitt, at Tordur Þordarson næstu fimm árini skal verða venjari hjá KR. Hann er kent fótbóltsnavn í Íslandi. Hann er fyrrverandi landsliðsspælari, sum fyri meiri enn tredivu árum síðani umboðaði Ísland í Føroyum. Seinastu næstan tredivu árini hevur hann búð uttanlands. Hann spældi í síni tíð fótbólt í Svøríki, Fraklandi og Sveis, og síðani í 1987 hevur hann verið venjari í Svøríki, Noregi og Estlandi. Har var hann bæði venjari hjá Flora Tallinn og estlendska landsliðnum, sum hann hevði ábyrgdina av í 58 landsdystum. Ein av dystunum var, tá ið Føroyar í 1997 vunnu vinardyst í Estlandi 2-0.



*Rógvi Jacobsen segði íslendskum fótbólti farvæl við einum sigri, tá hann spældi allar 90 minuttirnar fyri KR um vikuskiftið*

Setningurin hjá nýggja KR venjaranum, sum í síni tíð spældi við ÍA, verður at mynda nýtt lið, sum fyrst og fremst skal grundast á ungar KR spælarar.

Næstsíðsta umfarið royndist eisini væl hjá hinum Føroya felagnum í íslendskum fótbólti. Men Símun Samuelsen var als ikki á vøllinum, tá ið Keflavík á heimavølli vann 2-1 móti Fram, sum framvegis er í vanda fyri at missa sessin í bestu deildini.

Keflavík hevði vindin undan í 1. hálvleiki, tá ið teir fingu bæði málini. Báðu ferðirnar vórðu málini skorað við høvdinum eftir góð innlegg. Keflavík skoraði í 8. og í 34. minutti. Bara ein minutt eftir seinna málið minkaði Fram um munin, men hóast teir eftir steðgin høvdu vindin undan, so fingu teir ikki mál. Keflavík hevði tak á støðuni.

Leygardagin verður átjanda og síðsta umfarið spælt, og tá skal Keflavík spæla á útivølli móti grannunum í Grindavík. Teir eru illa sperdir í botnstríðnum. Fyri at sleppa undan niðurflyting er neyðugt hjá teimum at fáa fulla úrtøku móti Keflavík, og haraftur-at skulu onnur úrslit laga seg teimum til fyrimunar. Grindavík tapti í næstsíðsta umfarinum á Laugardalsvøllinum 3-2 móti Þrótti, sum kortini hevur mist rættin at halda fram í bestu deildini.

Í næstbestu deildini fekk Breiðablik í Kópavogi, sum Hans Fróði Hansen spælir við, leygardagin steypið handað fyri at hava vunnið næstbestu deildina. Leygardagin vann Breiðablik á heimavølli 2-1 á KA av Akureyri. Hans Fróði var ikki á vøllinum leygardagin, tí hann var leikbannaður.

At KA tapti í Kópavogi ber eftir øllum at døma við sær, at tað verður Víkingur úr Reykjavík, sum fer at flyta upp saman við Breiðablik. KA og Víkingur hava kappast um seinna uppflytingarplássið.

# Start aftur á toppinum

**Men tað var bara seinastu løtuna, at tað var pláss fyri Toda Jónsson, sum fríggjadagin vandi við fullari ferð fyri fyrstu ferð síðani landsdystin móti Fraklandi**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Sunnukvøldið legði Start seg aftur á odda í norsku landskappingini. Tað gjørdu teir við 2-1 heimasigri á HamKam. Venjari hjá hesum felagnum er Ståle Solbakken, sum var miðvallargeneralur í FCK, tá ið eisini Todi Jónsson hevði stóran leiklut í felagnum. Norskir og danskir miðlar hava leingi róð fram undir, at Ståle Solbakken verður næsti FCK venjarin, men hann arbeiðir framvegis í HamKam.

Fyrra umfarið hendi lítið. Beinanvegin eftir steðgin løgdu gestirni seg á odda, tá ið teir fingu fulla nyttu burtur úr ivasomum brotssparki. Síðani trýsti Start á naglan, teir javnaðu í 50. minutti, og í 63. minutti skoraðu teir sigursmálið.

Todi Jónsson var á vøllinum seks teir seinastu minuttirnar. Tá ið Start seinast spældi á heimavølli og vann 5-3 móti Rosenborg, skoraði Todi trý mál. Men hesa ferð metti venjarin hann ikki at vera nóg góðan at vera millum teir fyrstu ellivu. Todi noyddist skaddur av vøllinum, tá ið Føroyar spældu í Fraklandi, men nú er hann komin fyri seg aftur.

- Eg havi vant síðani týsdagin, og fríggjadagin vandi eg við fullari ferð. Eg kendi meg at vera nóg væl fyri at spæla frá byrjan, men tað er venjarin, sum ger av, hvussu liðið skal síggja út, staðfestir Todi Jónsson.

Lítlu løtuna, sum Todi var á vøllinum hevði hann fína skotroynd, sum málverjin beindi til hornaspark.

Størsti kappingarneytin hjá Start um meistaraheitið er framvegis Vålerenga úr Oslo. Leygardagin vunnu teir útsetta dystin móti Molde 3-1, og í kvøld skulu teir spæla í Fredrikstad í 20. umfarinum. Undan tí uppgerðini eru teir eitt stig aftan fyri Start, men teir hava altso møguleikan at endurvinna oddasessin í kvøld.

Tað verður longu nógv tosað um toppuppgerðina, sum verður 25. september, tá ið Start fer at fáa vitjan av Vålerenga. Øll atgongumerkini eru longu útseld til uppgerðina, sum verður mett at fara at verða lykladysturin í stríðnum um norska meistaraskapin.

Viking er triðja felagið, sum framvegis er við í gullstríðnum. Leygardagin vunnu teir á heimavølli 3-2 móti Rosenborg, sum eitt skifti var á odda 2-0. Trettan faldu meistararnir eru í svárari kreppu, og nú siga teir seg vera noyddar at fyrihalda seg til tann veruleikan, at tað skal enda við spæli um at sleppa undan niðurflyting.

Lyn hevur verið við í oddastríðnum, men teir mistu nógv, tá ið teir í vikuskiftinum taptu 2-1 á heimavølli móti Odd Grenland úr Skien.

Í botninum styrkti Bodø um sína støðu, tá ið teir á heimavølli vunnu 2-1 á Tromsø. Aalesund og Molde spæla í kvøld.